# Stórhending í prentfakinum í Føroyum

**Eitt prent sum áður kundi taka upp í 8 tímar, tekur í dag 8 minuttir", sigur Tróndur Joensen við Sosialin. Felagið Sjónband hevur keypt eina serliga maskinu, og hon er tann einasta av sínum slag í Føroyum**

MARGFALDING
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*



*HP Indigo 5000 – nýggjasta tøknin er komin til Føroya*

*Mynd: Alvin Ellebye Andersen*



*Tróndur Joensen, stjóri í Sjónband*

*Mynd: Alvin Ellebye Andersen*

Tá ið vit koma oman í kjallaran í Sjónband, er tað fyrsta vit síggja ein stóran kassa. Men hetta er ikki ein vanligur kassi – hetta er ein prentimaskina sum ikki hevur sín líka í kongaríkinum. Maskinan er sera framkomin, og danir fáa sína fyrstu maskinu í næstum.

Margmiðlahúsið Sjónband gjørdi í síðstu viku eina stóra íløgu í framtíðina. Tá keyptu tey eina digitala prentimaskinu, sum er før fyri at hagreiða uppgávur skjótari enn áður sæð í hesum landi. "Talan er um eina maskinu av slagnum HP Indigo 5000", sigur Tróndur Joensen, stjóri í Sjónband. Prentfakið hevur verið í eini støðugari menning seinastu nógvu árini. Í høvuðsheitum kunnu vit býta menningina í prentfakinum í tríggjar partar. Fyrst varð prentað við blýggið. Síðan kom "offsett" skipanin. Hetta var ein maskina sum gjørdi nógv skjótari av enn áður. Men nú verður prentifakið kollvelt, tí at nú verður fakið digitaliserað.

## Stutt um fyritøkuna

Søgan um fyritøkuna Sjónband er ein søga um eina fyritøku í støðugari menning. Tróndur Joensen greiður frá, at hann byrjaði fyri 10 árum síðan í einum kamari, og síðan hevur fyritøkan bara ment seg. Í dag starvast 10 fólk í fyritøkuni.

Sjónband framleiðir millum annað sjónvarpssendingar fyri Kringvarp Føroya, og tey gera eisini sjónvarpslýsingar fyri fyritøkur.

Umframt hetta prentað tey alskyns uppgávur fyri fyritøkur, og her kann vera talan um alt frá lýsingarbløðum til stórar bannarar.

## Ferðin økist

"Í veruleikanum gongur alt nógv skjótari í dag. Ein kann í prinsippinum taka nakrar myndir til eina brúðarvígslu, og síðan senda okkum myndirnar umvegis teldupost. Síðan taka vit tær niður og prenta tær á eitt sanghefti, sum er kann takast í brúk til døgurðan seinnapartin", greiðir Tróndur frá. Hóast at tey vanliga ikki takast við tílíkar uppgávur, so kann ein tílík mynd nýtast til at lýsa, hvussu skjótt hendan maskinan arbeiðir.

"Við hesi maskinu hava vit ein garanti fyri góðskuni. Tað sum lýsarin sendir okkum, verður prentað júst sum teir vilja hava tað. Og av tí at alt er digitalt, so er góðskan eisini sera støðug", sigur Tróndur. Maskinan er keypt úr Svøríki, og í løtuni er ein svensk kvinna í Sjónband fyri at læra starvsfólkið at brúka maskinuna.

## Góðska og skjótleiki

Meðan vit standa og práta, baksast ein annar við at prentað 500 A4 síðir til eina fyritøku. Tróndur er fryntligur og vísir okkum hvussu alt fyriferst. Hann greiðir frá hvar teldan stendur, og vísir okkum alt sum er rundan um maskinuna. Maskinan er ikki meir enn farin í gongd, tá ið hon aftur steðgar. Ikki tí at stíggjur er komin í, men tí at hon longu er liðug við uppgávuna. Tróndur Joensen vísir okkum endaliga úrslitið og hyggur eftir klokkuni. "Hatta tók fýra minuttir", sigur hann við einum smíli. Vit granska prentið, og koma ásamt um at góðskan so sanniliga er í lagið.

## Vilja fáa uppgávur heim

"Hóast vit hava tí bestu útgerðina í Føroyum, so leggja vit okkum ikki eftir at taka kappingina upp við føroysku fyritøkurnar. Tað er so, at sera nógvar fyritøkur senda prentiuppgávur av landinum, og tað er her at vit kunnu gera munin. Vit vilja gjarna fáa hesar uppgávur aftur til landið, tí at vit hava førleikan, og so sanniliga eisini kappingarføri til tað", sigur stjórin í Sjónband Tróndur Joensen.

Vit kunnu tillaga okkum til brúkaran. Um brúkarin ikki er heilt vísur í hvussu stórt upplag av t.d. einum bóklingi, so byrja vit bara í smáum. Tí tað er onki til hindurs fyri at gera nøkur eyka upplag seinni. Soleiðis er skipanin nógv meiri fleksibul enn hon var áður.

"Eitt nú kunnu vit prenta eitt eintak av eini bók, soleiðis at rithøvundurin kann síggja bókina í sínum veruliga líki, heldur enn at prentað t.d. 300 eintøk. Áður hevði hetta verið ein stirvin og kostnaðarmikil uppgáva, men í dag letur hetta seg væl gera", sigur Tróndur.

Tann 1. apríl verður fyritøkan Sjónband 10 ár.